VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

Tórshavn, tann 14.desember 2010
Vmr. J.Nr.: 10/00711 /

Viðgjørt:

**Løgtingsmál nr. /2010: Uppskot til løgtingslóg um at broyta løgtinslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing,**

## Uppskot

## til

## løgtingslóg um at broyta løgtinslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing

**§ 1.** Í løgtinslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar.

**1)** § 19 verður orðað soleiðis:
“**§ 19.** Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði, ávíst av arbeiðsávísingini, missir rættin til arbeiðsloysisstuðul, sbr. tó pkt. 2. Fyrstu ferð tann arbeiðsleysi noktar, sum nevnt í pkt 1, missir hann rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, aðru ferð í 8 vikur, triðju ferð í 12 vikur og fjórðu ferð í 6 mánaðir, at rokna frá degnum eftir, at fráboðanin um arbeiðstilboðið má roknast við at vera móttikið av tí arbeiðsleysa.
*Stk. 2.* Um stýrið tekur undir við ásetingunum, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur fyri, nær talan er um serliga orsøk o.l.”

**2)** Eftir § 19 verður sett:
“**§ 19 a.** Um arbeiðsleysur uttan serliga orsøk, ikki møtir upp til skeiðstilboð, sum hann hevur fingið bjóðað frá Arbeiðsloysisskipanini og hevur tikið av, hevur viðkomandi skyldu at endurrinda arbeiðsloysisskipanini útreiðslurnar, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur havt til skeiðið. Í tann mun tað ber til, er heimilað Arbeiðsloysisskipanini at mótrokna hesar útreiðslur í arbeiðsloysisstuðli til viðkomandi.
*Stk. 2.* Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk, aðru ferð ikki møtir upp til skeiðstilboð, sum viðkomandi hevur fingið bjóðað frá Arbeiðsloysisskipanini og hevur tikið av, missir, umframt at endurrinda Arbeiðsloysisskipanini skeiðskostnaðin sambært stk. 1, rættin til arbeiðsloysisstuðul í fýra vikur at rokna frá degnum, eftir at Arbeiðsloysisskipanin fær kunnleika til, at viðkomandi ikki møtti upp.
*Stk. 3.* Um stýrið tekur undir við ásetingunum, kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur fyri, nær talan er um serliga orsøk o.l.”

**§ 2.** Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 60 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: VMR@VMR.FO

# Viðmerkingar til lógaruppskotið

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

### 1. Endamálið við lógini

Endamálið við lógaruppskotinum er, at arbeiðsloysiskipanin í størri mun skal elva til, at arbeiðsleys ikki vera bundin at arbeiðsloysistuðli, men skjótari kunnu koma aftur í arbeiði.

### 2. Galdandi reglur

Eftir ALS-skipanini er útgangsstøðið, at tann arbeiðsleysi hevur skyldu at átaka sær eitt og hvørt arbeiði í Føroyum, og at hann uttan avmarkingar hevur skyldu til at átaka sær eitt og hvørt fulldagsstarv, sum viðkomandi hevur fakligan førleika til.

Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði, ávíst av arbeiðsávísingini, missir rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur.

Heimild er í lógini át áseta nærri reglur um serligar orsøkir o.l, og eru tílíkar ásettar í útgjaldskunngerðini.

Eftir § 14, stk. 3 í galdandi galdandi lóg kunnu arbeiðsleys, eftir nærri ásettum treytum, við loyvi frá Arbeiðsloysisskipanini, sleppa undan treytini at vera tøk á arbeiðsmarknaðinum og samstundis fáa arbeiðsloysisstuðul. Eftir útgjaldskunngerðini sleppa arbeiðsleys undan treytini í sambandi við útbúgvingarskeið ella líknandi. Við styttri tíðarskeið skilst í mesta lagi 3 mánaðir í hvørjum álmanakkaári. ALS skipar fyri førleikagevandi skeiðum fyri arbeiðstøk, sum skulu betra møguleikarnar hjá arbeiðsleysum at koma aftur á arbeiðsmarknaðin. Tey arbeiðsleysu fáa arbeiðsloysisstuðul, meðan tey eru á skeiði, og ALS rindar tað, sum skeiðið kostar. Í nøkrum førum hendir tað, at arbeiðsleys ikki møta upp til skeiðið, sum tey hava tikið av, m.a. við tí avleiðing, at ALS fær óneyðugar útreiðsur til skeið, sum ikki vera brúkt.

### 3. Atfinningar at galdandi reglum

Arbeiðsloyisiskipanin er ein skipan um endurgjald fyri mista lønarinntøku orsakað av arbeiðsloysi, sum ikki kann tilroknast tí arbeiðsleysa. Meginreglan í eini skipan sum hesari eigur tí at vera, at tann arbeiðsleysi hevur skyldu til at viðvirka til at minka um avleiðingarnar av arbeiðsloysinum, heruppií á virknan hátt søkja sær arbeiðið aftur og taka av ávistum arbeiði og at luttkaka í tiltøkum, sum kann gera tað lættari at fáa arbeiði aftur.

Eftir galdandi lóg er avleiðingin av, at arbeiðsleysur ikki tekur av arbeiðstilboði í øllum førum, at tann arbeiðsleysi fær karantenu í 4 vikur – eisini um vikomandi fleri ferðir hevur noktað at taka av arbeiðstilboði.

Tí verður mett, at galdandi reglur ikki í nóg stóran mun elva til, at arbeiðsleys ikki vera bundin at arbeiðsloysisstuðli, men skjótt kunnu koma aftur í arbeiði.

Um arbeiðsleys, uttan orsøk fyri tí, ikki møta upp til skeiðið, sum tey hava teknað seg til, hevur tað m.a. við sær, at ALS fær óneyðugar útreiðsur til skeið, sum ikki vera brúkt. Hetta eigur at hava avleiðingar fyri tann, sum uttan orsøk, ikki møtir til skeið, sum viðkomandi hevur teknað seg til, men tað er tað ikki heimild til í galdandi lóg.

**4. Høvuðsinnihaldið í uppskotinum.**
Stýrið fyri ALS hevur hevur mælt til broytingar í ALS lógini og hevur gjørt uppskot um tað, og hetta lógaruppskotið hevur støði í uppskotinum frá ALS- stýrinum.

Eftir uppskotinum verður avleiðingin av, at arbeiðsleysur ikki tekur av arbeiðstilboði, uttan eina serliga grund fyri tí, at hann missir arbeiðsloysisstuðulin. Tann arbeiðsleysi missir rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, fyrstu ferð hann noktar uttan serliga grund, í 8 vikur aðru fer hann noktar, í 12 vikur triðju ferð, og í 6 mánaðir fjórðu ferð hann noktar at taka av arbeiðstilboði uttan serliga grund fyri tí.

Samstundis verður skotið upp, at arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk, ikki møtir upp til skeiðstilboð, sum hann hevur fingið bjóðað frá Arbeiðsloysisskipanini og hevur tikið av, hevur skyldu at endurrinda arbeiðsloysisskipanini útreiðslurnar, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur havt til skeiðið. Í tann mun tað ber til, verður heimilað Arbeiðsloysisskipanini at mótrokna hesar útreiðslur í arbeiðsloysisstuðli til viðkomandi.

Eisini verður skotið upp, at arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk aðru ferð ikki møtir upp til skeiðstilboð, sum viðkomandi hevur fingið bjóðað frá Arbeiðsloysisskipanini og hevur tikið av, missir rættin til arbeiðsloysisstuðul í fýra vikur.

**5. Ummæli**

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

**1. Fíggjarligar avleiðingar**

**A. Fyri landið**

**B. Fyri kommunurnar**

**C. Fyri vinnuna**

**2. Umsitingarligar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar.

**3. Umhvørvisavleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

**4. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**5. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**6. Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

**Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1:**

***Nr. 1***
Eftir hesi ásetingini missir arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði, ávíst av arbeiðsávísingini, rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, fyrstu ferð tann arbeiðsleysi noktar, í 8 vikur aðru ferð hann noktar, í 12 vikur triðju ferð og í 6 mánaðir fjórðu ferð tann arbeiðsleysi noktar, at rokna frá degnum eftir at fráboðanin um arbeiðstilboðið má roknast við at vera móttikið av tí arbeiðsleysa.

Nærri reglur fyri, nær talan er um serliga orsøk o.l., eru ásettar í útgjaldskunngerðini. Avgerðin um tað eru serligar orsøkir, sum kunnu grunda, at tann arbeiðsleysi ikki átekur sær arbeiði, sum ALS hevur ávíst, verður tikin eftir ítøkiligari meting. Eftir útgjaldskunngerðini kunnu serligar orøkir m.a. vera: Um lønin fyri ávísta arbeiðið er lægri enn sáttmálalønin fyri slíkt arbeiði, um daglig ferðing til og frá arbeiði ikki er møgulig, og bústaðarviðurskiftini á staðnum, har arbeiðið er, eru sera vánalig, ella um talan er um serliga vánaligar ferðamøguleikar til og frá arbeiði, og viðkomandi er einligur við smærri børnum.

***Nr. 2***
Skotið verður upp í hesi ásetingini, at tann arbeðsleysi skal hava skyldu til at endurrinda ALS útreiðslurnar til skeið, sum ALS hevur boðið honum, men sum hann uttan orsøk ikki møtir til, og at ALS skal kunna mótrokna kravið í útgjaldinum frá ALS. Harumframt verður skotið upp, at aðru ferð tann arbeiðsleysi uttan orsøk ikki møtir til tílík skeið, skal tað hava ta avleiðing, at viðkomandi missir rættin til útgjald í 4 vikur.

**Til § 2**
Lógin skal koma i gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd

**Johan Dahl**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen